

# Goymslu- og flutningsleiðari

**Eitt spennandi starv við stórum avbjóðingum sum goymslu- og flutningsleiðari hjá Poul Hansen heilsølu í Tórshavn er leyst at søkja**

Goymslu- og flutningsleiðarin er ein sentralur persónur í fyritøkuni. Hann hevur ábyrgdina av vøruni, til hon stendur hjá kundanum, og hann samskipar vørumóttøku, vøruavgreiðslu og vøruflutning.

Tað hevur stóran týdning, at goymslu- og flutningsleiðarin kann reka goymsluna skynsamt rakstrarliga, og at hann er kunda- og tænastuvinarligur.

Tú skalt vera førur fyri at taka skjótar avgerðir, tá tað krevst.

Tað gongur mangan skjótt fyri seg, og tí er neyðugt at duga at skipa væl fyri, hóast tú arbeiðir undir trýsti.

Á goymslu- og flutningsdeildini eru 25 starvsfólk í dag, so tað er eitt krav, at tú hevur leiðsluroyndir. Royndir innan goymslu, flutning og handil er ein fyrimunur. Viðkomandi útbúgving er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Teldukunnleiki á brúkarastøði krevst.

Løn sambært avtalu. Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. november.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Høgna Hansen, stjóra, á telefon 311161.

Send umsóknina til:

P/F Poul Hansen, heilsølu
Postboks 3016
FO-110 Tórshavn

P/F Poul Hansen er størsta heilsølan í Føroyum. 60 fólk starvast í fyritøkuni, sum varð stovnað í 1927 og sostatt hevur 75 ár á baki. Vørugoymslan er 4500 fermetrar. Poul Hansen umboðar sterk og dygdargóð vørumerki, og umleið 4000 ymisk sløg eru í vøruskránni.

Poul Hansen Heilsøla
sterkar merkivørur í 75 ár

# Brúktbilakeyp?

## Ein spurningur um álit og trygd!

Jú, prísin kunnu vit altíð tosa um,
men dentin leggja vit enn sum áður á, at dygdin
og trygdin eru í lagi í sambandi
við brúktbilakeyp...!



Á myndunum sæst eitt tilvildarligt úrval úr mongu tilboðunum á Føroya mest fjøltáttaða brúktbilamarknaði

**Reyni Service**
- fá meira at vita á www.reyniservice.fo

Vegurin Langi
188 Hoyvík
Tlf- 353040



# Sømdargáva til Ingrið

**Ingrið Sondum fekk hóskvøldið handaða sømdargávu úr Grunni Kristians á Brekkumørk sum viðurkenning fyri gott og íði starv føroyskum máli at frama.**

VIÐURKENNING

*Edvard Joensen*



*Ingrið Sondum fekk hóskvøldið handaða sømdargávu á samkomu í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Bókadeild Føroya Lærarafelags*

Hóskvøldið var samkoma í Norðurlandahúsinum, har Føroya Fróðskaparfelag handaði Ingrið Sondum sømdargávu úr Grunni Kristians á Brekkumørk.

Føroya Fróðskaparfelag sigur í grundgevingini fyri at geva Ingrið Sondum sømdargávuna, sum er 15.000,- krónur, millum annað, at sum lærari og skúlabókavørður hevur Ingrið Sondum tíðliga ásannað, at skal lív vera lagað føroyskum máli, er alneyðugt við barnabókum, ungdóms- og skúlabókum á føroyskum.

Tað var ikki sjálvsagt fyri bara 25 árum síðan, sigur Føroya Fróðskaparfelag. Tá vóru tað bara einstakar eldsálir, sum eftir lokið dagsverk fingust við at skipa fyri tílíkari bókaútgávu. Ingrið var ein teirra, sum talaði fyri at seta pening av og yrkisforløg á stovn til hetta endamál.

Hetta arbeiði hennara hevur borið frukt, vísir Fróðskaparfelagið á í grundgving síni og nevnir her Bókadeild Føroya Lærarfelags, ið ikki minst er prógv um, at so er. Deildin varð umskipað til yrkisforlag í 1985, og Ingrið Sondum varð sett í leiðarastarv.

Í hesum stavi hevur hon havt ómetaliga stóran týdning fyri føroyska barnabókaútgávu. Sum íbirtari og slóðbrótari hevur hon sett sær høg mál og stríðst fyri teimum, til tey eru rokkin.

Føroyskar barnabøkur vóru fáar, tá Ingrið tók við, men hon setti sær sum mál, at føroyskar bøkur skuldu vera natúrligt fyrstaval, tá føroysk børn skuldu hava bøkur.

Tá hon legði frá sær í 1995, kundi ásannast, at mál hennara var rokkið, og at Bókadeildin nú regluliga gevur út dygdargóðar bøkur til børn og ung.

– Hetta, sum fyri bara 20 árum síðan var ynskidreymur, er nú veruleiki, sigur Føroya Fróðskaparfelag í grundgeving síni.

So hvørt eitt mál var rokkið, fór hon eftir tí næsta. Fyrst var tað Barnabókaklubbin, sum varð stovnaður, so til bar at røkka børnum um alt landið. Síðan var bókaklubbin UNG settur á stovn. Og tá alt hetta var komið í trygga legu, var farið undir onnur stórverk sum til dømis Føroya fyrstu alfrøði, sum Bókadeildin gav út saman við Føroya Skúlabókagrunni.

Eisini í hesum førinum var Ingrið Sondum tann, ið trúði uppá, at tað bar til, og fekk framt ætlanina, sigur Føroya Fróðskaparfelag í grundgeving síni fyri at lata Ingrið Sondum sømdargávuna úr Grunni Kristians á Brekkumørk.

Stovnsfæið í grunninum er OSSIAN-heiðurslønin, sum FVS-stovnurin í Hamburg lat Christiani Matras og Føroya Fróðskaparfelag í 1981. Eftir uppskoti hansara, ið grunnurin ber navn eftir, (t.e. Chr. Matras, blðm.) hevur grunnurin til endamáls at styðja virki einstaklinga føroyskum máli at frama.

Í samband við at vit taka nýggja útsølubúð í nýtslu mikudagin, hin 30. oktober, hava vit

**Móttøku**

í Havnardali (Akranesgøtu 10) týsdagin 29/10-2002, frá kl. 16.00 til 18.00.

Vit vóna at síggja fjøld av vinum og viðskiftafólki.

Føroya Bjór

**Føroya Bjór, avgreiðslan**
við Velbastaðvegin

hallo.fo

TILBOÐ !!
frá Hallo.fo



NOKIA 3510

1495,-

Tilboðið er bert galdandi til 31.10.02
(ella so leingi vøran er á goymslu)

NOKIA ERICSSON SIEMENS MOTOROLA

www.hallo.fo

.....far inn á www.hallo.fo ella ring tlf. 218-500